Meginfelag Áhugaleikara Føroya

Í Hans Andriasarhúsi, 29. januar 2018

# AÐALFUNDURIN 2018

**Limagjaldið fyri 2018**
**skal gjaldast á konto**
***9181-185.132.4***
**Feløg 1.000,- kr.**
**Bólkar 700.- kr.**

***Góðu felagslimir***

Aðalfundurin verður í **Losjuni við Gøtugjógv**

**<u>leygardagin 10. mars 2018 kl. 11.00 -15.00</u>**

Allir limir í limafeløgunum hava rætt at møta á aðalfundinum.

**SKRÁ:**

1. Aðalfundurin verður settur og fundarstjóri og -skrivari valdir
2. Formansfrágreiðing
3. Kassameistarin leggur roknskapin fram
4. Umrøða/góðkenning av formansfrágreiðing og roknskapi
5. Innkomin mál
6. Áseta limagjald
7. Velja nevndarlimir og varalimir
8. Velja grannskoðara
9. Ymiskt

Fyri vali standa nevndarlimirnir **Noomi Reinert, Rúna Mortensen** og **Beinta Flóvinsdóttir** og nevndarlimirnir **Rudolf Joensen** og **Maj-Britt W. H. Jacobsen**. Við øðrum orðum skulu veljast 3 limir og 2 varalimir. Noomi og Rúna hava boðað frá, at tær báðar stilla upp aftur. Beinta stillar ikki upp aftur.

Á aðalfundinum hava sjónleikarafeløg 6 og ungmannafeløg/bólkar 2 atkvøður. Undan fundinum verða tit biðin um at gera av, hvør skal atkvøða fyri tykkara felag/bólki. **<u>Bert uppmøttir limir hava atkvøðurætt</u>**.

Mál at leggja fyri aðalfundin skulu vera MáF í hendi **<u>ikki seinni enn 24. februar 2018.</u>**

Allir limir í MáF, sum hava fylt 18 ár, kunnu vera í uppskoti til nevndarval. **<u>Uppskotini til nevndarlimir í MáF skulu vera skrivlig og kunnu sendast í telduposti ikki seinni enn 24. februar 2018.</u>**

**Hjálagt:**

./. Lóg Meginfelag áhugaleikara Føroya
./. Fundarfrágreiðing frá aðalfundinum 11. mars 2017

***Legg til merkis:***
**Er limagjaldið ikki goldið**
**14 dagar fyri aðalfundin,**
**fellur atkvøðurætturin**
**á aðalfundinum burtur!**

**Blíðar heilsanir**
**f. MáF**

***Ingun Christensen***
*fyrisitingarleiðari*

**MáF** - undir Pisuvarða 2 - postsmoga 185 - FO-110 Tórshavn - Føroyar - tlf. 315624 og 285624
maf@maf.fo . www.maf.fo